## 16.000 klipp fyrsta ársfjórðingin

Tað gongst so illa hjá donskum bilførarum at halda ferðslureglurnar, at tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár hava ikki færri enn 16.000 bilførarar fingið klipp í koyrikortið. Tað er serliga ferðin, sum fólk hava ilt við at halda. Heilar 13.062 ferðir vórðu bilar skrivaðir upp fyri at koyra meiri enn 30 prosent skjótari enn hámarksferðina, og tað brotið gevur bæði klipp og bót. Harafturat hava nógvir bilførarar ilt við at virða tað reyða ljósið, og 1.100 vórðu skrivaðir upp fyri at koyra, sjálvt um ferðsluljósið lýsti reytt. At enda vóru tað 894 bilførarar, sum brúktu skeiva vegbreyt.



## Dan Brown skrivað nýggja bók

"The Lost Symbol" eitur nýggj bók, sum tann heimskendi rithøvundurin Dan Brown hevur skrivað. Bókin, sum er eitt framhald av teirri kendu skaldsøguni "The Da Vinci Code", kemur ætlandi í bókabúðirnar tann 15. september. Hon kemur fyrst út í USA, Kanada og Bretlandi og verður prentað í fimm milliónum eintøkum. "The Da Vinci Code", sum kom í 2003, er seld í meiri enn 70 milliónum eintøkum. Harumframt er hon gjørd til film við Tom Hanks sum høvuðsleikara. Forlagið Random House sigur, at eins og í "The Da Vinci Code" er Robert Langdon høvuðspersónur í teirri næstu bókini.

# Noma er triðleskiligast

**Í gjárkvøldið varð kunngjørt, at danska matstovan við norðurlendsku matskránni, er nummar trý í eini altjóða kapping millum matstovur, og at kokkarnir á Noma eru heimsins bestir**

GOURMET

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*



*Føroyskar rávørur eru partur av væl umtóktu matskránni hjá Noma á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn, sum í gjárkvøldið varð vald til triðbestu matstovu í heiminum*

Tað gongur bert framá fyri René Redzepi, høvuðskokk á matstovuni á Norðuratlantsbryggjuni, Noma. Bara síðan 2006 hevur hann lyft matstovuna frá einum 36. plássi til eitt triðja pláss á listanum yvir heimsins bestu matstovur. Tað var í gjárkvøldið, at viðurkenda blaðið, Restaurant Magazine, kunngjørdi 50 tær best umtóktu matstovurnar í heiminum. Nummar eitt og tvey fóru til somu matstovur sum í fjør. Spanska El Bulli fekk 1. plássið, enska The Fat Duck endaði á 2. plássi, og 3. plássið fór til donsku matstovuna, Noma. Noma hevur flutt seg ikki minni enn sjey pláss upp eftir hesum lista síðan í fjør, og 33 pláss síðan 2006.

Harumframt vann Noma prestigufullu virðislønina, Chef's Choice Award, sum altso staðfestir, at kokkarnir á Noma eru teir bestu í heiminum. Tað eru høvuðskokkarnir frá 50 teimum bestu matstovunum, ið velja bestu kokkarnar til hesa virðisløn. Í dómsnevndini, sum avgerð hvør besta matstovan er, eru 806 matkritikkarar, kokkar og gastronomar.

Noma liggur á Norðuratlantsbryggjuni á Christianshavn. Matstovan hevur lagt seg eftir at bjóða ein persónligan og norðurlendskan køk við eini gourmetmatskrá. Høvuðskokkurin fór fyri nøkrum árum síðan í samstarv við kokkar í hinum norðurlondum, um at fáa til vega norðurlendskar rávørur til tess at seta saman eina norðurlendska matskrá. Úr Føroyum skaffast eitt nú øða, djúphavskrabbi og jómfrúhummari.

28 fólk eru í føstum starvi á matstovuni.

# Karsten Vogel, Fagrir Fuglar og K-trio

**Tann 1. mai er lurtaravinarlig jazzkonsert á Seglloftinum á Tvøroyri, og til ber eisini hjá fólki norðanfjørðs at koma til Suðuroyar á konsert og at gista fyri rímuligan penga**

KONSERT

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Karsten Fogel og Fagrir Fuglar hava saman við K-trio konsert á Seglloftinum á Tvøroyri tann 1. mai.

Karsten Vogel hevur spælt við Jazz/Rock bólkinum Burnin Red Ivanhoe, og instrumental fusión bólkinum Secret Oyster. Hevur verið á konsertferð saman við mætum nøvnum sum Weather Report og Herbie Hancock. Hevur vunnið fleiri virðislønir og í 2004 heiðraður sum "Lifetime" komponistur av Danska Kulturministerium.

Saman við Føgrum Fuglum hevur hann m.a. upptikið fløguna "Veðurløg" í Klæmintsgjógv í Hesti. Hann er kendur í Føroyum sum tónleikari, sum hevur samstarvað nógv við føroyingar og hann hevur vitjað her fleiri ferðir. Samstarv og útgávur í Føroyum prógva, at talan er um ein oyggjavin, ið heldur nógv av oyggjum og fólki í Føroyum.

Vogel hevur eisini roynt seg sum útvarpsvert og er hann sera fjøltáttaður í sínum virksemi. Her er ikki talan um hvønn sum helst!

K-trio er eitt ferðalið av trimum ungum framúrskarandi íslendskum jazztónleikarum. Í september í fjør luttóku teir í kappingini The Young Nordic Jazz Comets í Keypmannahavn. Teir vóru umboð fyri Ísland og vunnu hesa kapping.

- Eitt "must" fyri allar suðringar, og norðingar. Ein uppliving, ið ikki eigur at fara framvið borðinum, sigu Suðuroyar Tónleikafelag, ið er fyrireikari.

### Pakkaferð

Atgongumerkið kostar 100 kr. Men Tónleikafelagið vónar, at fáa fólk aðrastaðni frá at vitja Suðuroynna í samband við konsertina og hevur felagið hetta tilboð: Pakkaferð, íroknað kaffimunnur & køka hjá Café Thomsen, atgongumerki & gisting á Hotel Tvøroyri v/ morgunmati: 800 kr, tekning: Send teldupost til stf_2008@hotmail.com, við navn, bústaði & tlf. nr. Tilmelding er galdandi við at rinda á konto 9870-4095082 í Suðuroyar Sparikassa viðmerk: Jazz Event.

Atgongumerkini fáast eisini á Statoil á Tvøroyri og í Gundadali í Havn.



## Kenningar á sjógv

**Løgreglan í Klaksvík varð í nátt fráboðað, tí bilur var farin út av vestaru kai í Klaksvík. Talan vísti seg at vera um tveir mans í 30 árunum, ið høvdu koyrt útav**

POLITI TÍÐINDI

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Stutt eftir klokkan 01.00 í nátt varð løgreglan í Klaksvík fráboðað, tí ein bilur hevði rent á ein garð við posthúsið. Síðan gekk ein lítil løta til ein onnur fráboðan kom. Tá vóru tað fólk frá eystaru síðu av víkini, ið boðaðu frá, at ein bilur var farin útav kaiini.

Tað gekk skjótt frá tí at fráboðanin kom, til sløkkiliðið kundi staðfesta, at eingin var í bilinum. Einki fólk var at síggja, og varð leiting tískil sett í verk, sigur sløkkiliðsformaðurin. Tað vísti seg, at tveir mans vóru í bilinum, og at báðir høvdu svomið í land. Vakthavandi á løgreglustøðini í Klaksvík sigur, at illgruni er um, at mennirnir vóru ávirkaðir av rúsdrekka. Blóðroyndir vórðu tiknar av monnunum, sum skulu avgera um tað er so. Mennirnir vóru fyribils sendir til hús, meðan bíðað verður eftir blóðroyndunum.

Mennirnir eru kenningar hjá løgregluni í Klaksvík, og eru teir í 30 árunum.